UTTAN ÚR HEIMI

# Prutlar undir lokinum í Mississippi

**Ein 80 ára gamal skóhøggjari er ákærdur í sambandi við trý av teimum mest umrøddu morðunum í amerikanska borgararættindastríðnum. Ku Klux Klan fylgir við rættarmálinum**

RÆTTARMÁL
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*



*Edgar Ray Allen á veg í dómhúsið. Hann er ákærdur fyri at hava givið boð um trý morð fyri 41 árum síðani*

Mánadagin kom tann 80 ára gamli fyrrverandi skóhøggjarin Edgar Ray Killen í dómhúsið í býnum Philadelphia í amerikanska statinum Mississippi. Hann er ákærdur fyri at hava myrt teir tríggjar borgararættindastríðsmenninar Michael Schwerner, Andrew Goodman og Ben Chaney í 1964.

Teir tríggir, tveir hvítir og ein svartur, vóru á ferð í Mississippi, har teir royndu at fáa tey svørtu at skráseta seg sum veljarar. Hetta var sum nevnt í 1964, og tjúgu limir í Ku Klux Klan-felagsskapinum í tí lítla býnum Philadelphia gjørdu av at taka teir tríggjar. Teir vórðu burturfluttir og myrdir. Hálvan annan mánað seinni fann løgreglan líkini, sum lógu í einari næstan fýra metrar djúpari grøv.

Løgreglan á staðnum kannaði ongantíð morðini til fulnar, og tað komst av, at løgreglan hevði ikki størri virðing fyri teimum svørtu, enn Ku Klux Klan hevði. Trý ár seinni, í 1967, vórðu sjey limir í Ku Klux Klan skuldsettir fyri at hava verið uppi í einari samansvørjing ímóti teimum myrdu, sum tað æt. Eingin bleiv kortini ákærdur fyri morð, og eingin fekk meiri enn seks ára fongsul.

Longu tá vildu fleiri vera við, at Edgar Ray Killen var oddamaður hjá Ku Klux Klan í Philadelphia, og at tað var hann, sum legði morðini til rættis. Men hann var prestur og slapp undan revsing, tí ein av nevningunum sýtti fyri at døma ein prest. Málið bleiv tí slept, men gjørdist kortini kent um allan heimin orsakað av filminum »Mississippi Burning«.

Men nú er Edgar Ray Killen aftur í rættinum, og hesaferð er hann ákærdur fyri at hava givið boð um at myrða teir tríggjar borgararættindastríðsmenninar fyri 41 árum síðani. Tá hann var í rættinum í 1967, vóru allir nevningarnir hvítir. Soleiðis er ikki í hesaferð.

### Klanurin hjástaddur

Edgar Ray Killen hevur altíð avsannað, at hann hevur havt nakað samband við Ku Klux Klan, og at hann hevði nakað við tey trý morðini at gera. Men nakað man vera í tí, tí teir, sum hava ansað eftir honum í seinastuni, bera skelti, har tað stendur, at teir eru limir í »American White Knights of the Ku Klux Klan, Inc.«, skrivar Dagsavisen.

Tann ákærdi duldi heldur ikki sítt samband við Ku Klux Klan, tá hann kom í rættin mánadagin, tí á bringuni hevði hann eitt lítið merki hjá felagsskapinum. Fleiri vælvaksnir menn fylgdust við honum, men verji hansara avsannaði, at teir høvdu nakað við Ku Klux Klan at gera. Men seinni mátti hann taka orðini aftur. Tí Ku Klux Klan fylgir gjølla við, hvat sagt verður.

### Framvegis virkin

Derrick Johnson, sum er formaður í svarta borgararættindafelagsskapinum NAACP í Mississippi, sigur við Dagsavisen, at tað kemur ikki óvart á seg, at Ku Klux Klan fylgir við rættarmálinum.

– Hetta vísir, at klanurin er framvegis virkin í statinum. Teir eru racistar, og hetta rættarmálið er eitt týðandi lið í stríði okkara fyri einum rímiligum lívi – ikki bara í Mississippi, men í øllum USA, sigur Derrick Johnson.

Sjálvur var hann í rættinum mánadagin saman við tíggju ára gamla soninum.

– Tað gjørdi eg fyri at vísa honum, at í hesum landinum verða fólk drigin til svars fyri sínar gerðir, sjálvt um tað kann taka drúgva tíð.

## Nú skal hann útflýggjast

Tann 11. juli eru tíggju ár liðin síðani ta ræðuliga hópmorðið í bosniska býnum Srebrenica, og nú krevur USA, at høvuðsmaðurin aftan fyri illgerðina verður latin krígsbrotsmannadómstólinum í Haag innan tíggju ára dagin. Tað var Nicholas Burns, varauttanríkisráðharri, sum kom við kravinum.

Krígsbrotsmannadómstólurin fyri gamla Jugoslavia hevur fleiri ferðir kravt fyrrverandi bosniaserbiska generalin Ratko Mladic útflýggjaðan, tí hann hevði ábyrgdina av teimum serbisku hermonnunum, sum myrdu næstan 8.000 menn og dreingir í Srebrenica tann 11. juli í 1995. Í seinastuni hevur ljóðað, at teir serbisku myndugleikarnir hava tingast við Mladic, og at hann skal vera til reiðar at geva seg upp í hendurnar á myndugleikunum í Serbia. Tað hevur stjórnin í Beograd avsannað, og hon heldur uppá, at hon veit ikki, hvar tann eftirlýsti generalurin er.

Umframt Ratko Mladic vil krígsbrotsmannadómstólurin hava fatur á fyrrverandi bosniaserbiska leiðaranum Radovan Karadzic, tí hann er eisini skuldsettur fyri krígsbrotsverk undir krígnum á Balkan.

## Heim eftir 40 ár í útlegd

Ein kaldan dag í januar í 1965 gjørdi amerikanski hermaðurin Charles Robert Jenkins av at rýma úr sínari herdeild, sum hevði støð í Suðurkorea.

Hann fór um markið til Norðurkorea, og har gjørdu myndugleikarnir nógv burturúr. Jenkins bleiv ofta brúktur í ymsum propagandatiltøkum, men fyri trimum árum síðani eydnaðist tað honum at sleppa til Japan. Við sær hevði hann konuna og tær báðar døturnar. Konan er japonsk, men norðurkoreanar burturfluttu hana í 1978, so hon kundi virka sum lærari í japonskum máli.

Charles Robert Jenkins tordi ikki at fara til USA, tí hann var bangin fyri at verða ákærdur fyri at vera rýmdur til fíggindan. Í november í fjør fekk hann 30 daga fongsul fyri rýmingina. Tann dómin hevur hann sitið, og týskvøldið setti hann fyri fyrstu ferð í 40 ár fótin á amerikanska jørð, har hann fór beinleiðis til North Carolina at vitja mammu sína, sum er 91 ára gomul.

## Væntar batar

Andaligi leiðarin í Tibet, Dalai Lama, sigur við norska blaðið Aftenposten, at hann hevur góðar vónir um, at demokratiið fer at vinna fram í Kina í komandi árum.

Dalai Lama sigur, at Kina er vorðið eitt heimsveldi, og at landið lýkur næstan allar fortreytirnar fyri tí. Men enn hevur landið ikki vunnið sær altjóða viðurkenning, sigur hann og leggur afturat, at hana fær Kina ikki, fyrr enn landið verður eitt demokratiskt rættarsamfelag við óheftari kunning og átrúnaðarfrælsi. Dalai Lama heldur, at fyrr ella seinni fer tann kinesiska leiðslan at fremja hesar batarnar, tí hon hevur ikki annað í at velja.

Tann 6. juli verður Dalai Lama 70 ár, men hann hevur ongar ætlanir um at gevast við virksemi sínum, og hann sigur seg framvegis hava eina vón um, at hann ein dag sleppur aftuer til Tibet.

## Røkke byggir stórt

Norski vinnulívsmaðurin Kjell Inge Røkke fær skjótt gott útsýni, tí fyritøka hansara, Aker, hevur gjørt av at byggja ein skrivstovubygning á fyrrverandi Fornebufloghavnini í Oslo. Grundøkið kostaði Aker 150 milliónir norskar krónur, og norsk bløð skriva, at skrivstovubygningurin fer at kosta umleið eina milliard krónur.

Leif-Arne Langøy, sum er stjóri í Aker, sigur við bløðini, at tann nýggi bygningurin skal hýsa øllum Aker-fyritøkunum, sum halda til á Oslo-leiðini. Talan er um 2.100 starvsfólk, og tey flyta væntandi inn í nýggju skrivstovurnar um hálvtannað ár.

Avgerðin at byggja nýggja bygningin bleiv tikin á seinasta aðalfundi, sum var í mars. Tá var uppskot um at nevna bygningin eftir Røkke sjálvum, men tað bleiv ikki samtykt. Kortini eru tað fleiri, sum longu hava givið tí komandi bygninginum navnið »Røkke Plaza«.